# Álit um høvuðskunngerð um SIT

## Innihald

Frágreiðing frá arbeiðsbólkinum .................................................. bls. 3
Uppskot um kunngerð ................................................................. bls. 9
Almennar viðmerkingar ............................................................... bls. 19
Viðmerkingar til ávísar greinir ..................................................... bls. 20

Fylgiskjøl:
- førleikaøkið í útbúgvingini ..................................................... bls. 21
- vegleiðandi reglur um evnisskeið ........................................... bls. 23
- vegleiðandi reglur um ger av lesiætlanum .............................. bls. 24

*Tilevnað av arbeiðsbólkinum, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið í mars 1999 setti til at gera uppskot um høvuðskunngerð um SIT*

Handað stýrinum í juni 2000

# Álit um dagførda SIT-skipan

Undirvísingar- og Mentamálastýrið setti tann 14. mars 1999 ein arbeiðsbólk til at gera uppskot um kunngerð (høvuðskunngerð) um støðisútbúgvingina innan tøkni.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið tilnevndi hesi at verða limir í arbeiðsbólkinum:

Atli Feilberg Hansen, faklærari í Tekniska Skúla í Klaksvík og formaður í arbeiðsbólkinum,
Marita S. Hentze, faklærari í Tekniska Skúla í Tórshavn
Tummas Lauritsen, faklærari í Tekniska Skúla í Tórshavn, og
Eyðgunn Samuelsen, deildarleiðari í Tekniska Skúla í Klaksvík.
Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðari og seinni eisini Jógvan Hammer, undirvísingarleiðari, báðir í Undirvísingar- og Mentamálstýrinum.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er sambært tilnevningarskrivinum hesin:

*"Høvuðskunngerðin eigur at vera gjørd við atliti til, at SIT-útbúgvingin skal vera støði undir lærlingaútbúgvingum, víðari tøkniútbúgvingum og framhaldandi HT-útbúgving umframt at verða ein útbúgving í sær sjálvari. Arbeiðsbólkurin eigur tí at hava hesi viðurskifti í huga:*

- *Kunngerðin skal vera í samsvari við tær ætlanir, ið lógu aftanfyri álitið frá februar 1999 um tøkniútbúgvingar og við uppskotið um lóg, sum nú er lagt fyri løgtingið. (Viðm.: lógin varð samtykt í Løgtinginum 23. apríl 1999)*
- *Arbeiðsbólkurin eigur í arbeiðinum við uppskotinum at samskifta við arbeiðsbólkin, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sett til at gera uppskot um høvuðskunngerð um HT, fyri m.a. at tryggja, at samsvar er við ásetingarnar í kunngerðini um støðisútbúgvingina og ásetingarnar í kunngerðini um HT útbúgvingina.*
- *Við atliti til, at útbúgvingin er býtt í eitt fyrsta og annað ár, eigur kunngerðin neyvt at lýsa bæði árini.*
- *Arbeiðsbólkurin eigur at samskifta við lærara o.o., sum arbeiða í teimum ymsu útbúgvingarpørtunum í báðum skúlunum, har støðisútbúgvingin beinleiðis ella óbeinleiðis hevur ella kann hava týdning.*

*Uppskotið um høvuðskunngerð eigur at verða gjørt eftir sama leisti, sum aðrar høvuðskunngerðir á miðnámsøkinum, herundir høvuðskunngerðin um FHS, og fata um:*

- *Bygnað og innihald í útbúgvingini í báðum árunum*
- *Upptøka av næmingum til bæði árini*
- *Undirvísingina í báðum árunum*
- *Próvtøku – herundir tal av próvtøkum og útrokning av próvtølum í lærugreinum á ávísum stigi*
- *Eftirmeting*
- *Stakgreinalesandi og sjálvlesandi*
- *Aðrar ásetingar - herundir kærur í námsfrøðiligum málum, royndar- og menningarvirksemi og skúladagatal.*

Sambært § 2 í lógini um støðisútbúgvingina innan tøkni frá 23. apríl 1999, skal *"ùtbúgvingin verða støði undir framhaldandi yrkisútbúgving, undir víðari tøkniligari útbúgving og undir hægri tøkniligari próvtøku. Útbúgvingin kann eisini enda við sjálvstøðugum prógvi".*

-----

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við at gera nýggju kunngerðina um støðis-útbúgvingina innan tøkni (hereftir nevnd SIT) við støði í omanfyri nevndu lóg og samsvarandi omanfyri nevnda arbeiðssetningi hjá Undirvísingar- og Mentamála-stýrinum, og er komin til hesar niðurstøður:

1) Fyrra støðisárið verður skipað samsvarandi § 2 stk. 2 í lógini um SIT, sum ásetir soleiðis: *"Sum støði undir yrkisútbúgving varir útbúgvingin eitt ár, og verður hon skipað samsvarandi teimum krøvum, sum ásett eru í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar".*

2) Fyrra støðisárið er býtt upp í tvinnar breytir: Tøknibreytin og HT-breytin. Tøknibreytin er býtt upp í 4 eindir (1. - 4. støðiseind) á 20 vikur hvør. 1. støðiseindin hevur sama innihald og somu skeiðslongd, sum fyrsta skúlaskeið hjá lærlingum. Hetta skúlaskeið byrjar í august og endar í januar (20 vikur).

   2. støðiseind svarar í minsta lagi til 2. skúlaskeið hjá lærlingum í viðkomandi yrkisgrein. Har tíðin røkkur, inniheldur hendan støðiseindin eisini 3. skúlaskeið hjá lærlingum. Ì 1. støðiseind hava næmingarnir støddfrøði og føroyskt á E/C-stigi. Hesar lærugreinir halda fram í 2. støðiseind og enda tá við próvtøku á C-stigi. Næmingur, ið hevur lokið bæði tað fyrra og tað seinna støðisárið, hevur tilsamans havt 6 lærugreinir á C-stigi (sí myndil A).

*3)* Seinna støðisárið verður skipað samsvarandi § 2, stk. 2 í lógini um SIT, sum ásetir soleiðis: *"Sum støði undir víðari tøkniligari útbúgving varir útbúgvingin tvey ár, og verður hon skipað samsvarandi teimum krøvum, sum eru ásett til tær viðkomandi útbúgvingarnar."*

   Í seinna støðisárinum kann yrkisparturin býtast upp í modulir, sum tann einstaki næmingurin velur samsvarandi krøvunum til víðari útbúgving. Hetta merkir, at næmingur sum dømi kann velja tey kravdu maskinmodulini og eitt ella fleiri el-modul.

4) Útbúgvingin er skipað soleiðis, at SIT-næmingur, sum í fyrra og seinna støðisárinum hevur tikið tey skúlaskeið, ið eru kravd í viðkomandi yrkis-útbúgving, skal fáa frítøku fyri skúlagongd og stytting í lærutíðini eftir tilmæli frá viðkomandi yrkisnevnd.

5) HT-breytin er skipað samsvarandi § 2 stk. 4 í lógini um SIT, sum ásetir soleiðis: *"Sum støði undir hægri tøkniligari próvtøku verður útbúgvingin skipað sum eitt støðisár og samskipað við undirvísingina til hægri tøkniliga próvtøku".* Í HT-breytini - eins og í tøknibreytini - eru 2 vikur skipaðar sum eitt innleiðsluskeið til samlaðu útbúgvingina (sí myndil B).

6) Arbeiðsbólkurin mælir til, at fyrra støðisárið byrjar við, at skúlin skipar fyri einum innleiðsluskeiði á 2 vikur, ið verður skipað samsvarandi § 11, stk. 3 í lógini um SIT, sum ásetir soleiðis: *"einstaka næminginum verður boðin yrkis- og útbúgvingarvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetir".*

7) Haraftrat mælir arbeiðsbólkurin til, at skipað verður fyri "brúgvatilboðum" í fólkaskúlanum við einum innihaldið, har næmingar í 10. flokki kunnu royna áhuga og evni innan tøkniligu útbúgvingarnar (líkt T1 í gomlu skipanini). Hetta vil geva næmingunum størri kunnleika um breytirnar í SIT-útbúgvingini og harvið lætta um gongdina frá fólkaskúlanum til miðnámsútbúgvingarnar. Hetta er eisini í samsvari við útbúgvingarálitið: "Føroyskur Førleiki" (1999).

8) Almennar reglur, so sum upptøkukrøv, næmingaskyldir, ársmet og skipan av próvtøku, eru skipaðar eftir sama leisti, sum aðrar miðnámsútbúgvingar.

9) Um so er, at undirvísingin í yrkislærugreinum og fakligum grundlærugreinum er samskipað við undirvísingina fyri lærlingar, fara næmingarnir upp til roynd saman við lærlingunum og samsvarandi reglunum fyri viðkomandi yrkis-útbúgving. Verður undirvísingin ikki samskipað, fara næmingarnir tó upp til roynd í yrkislærugreinum og fakligum grundlærugreinum samsvarandi teimum reglum, ið eru galdandi í yrkisútbúgvingarskipanini.

Sambært § 10 í uppskotinum til kunngerðina, eru lærugreinirnar í tøknibreytini hesar:

***Myndil A: "Tøknibreytin"***

| | **Fyrra støðisár** | | **Seinna støðisár** | |
|---|---|---|---|---|
| | **1. støðiseind** | **2. støðiseind** | **3. støðiseind** | **4. støðiseind** |
| ***Lærugreinir og stig*** | ***20 v á 40 t.*** | ***20 v á 40 t.*** | ***20 v á 36 t.*** | ***20 v á 36 t.*** |
| ***Yrkislærugreinir*** | 20 t/v | 16 t/v | 14 t/v | 20 t/v |
| ***Fakligar grundlærugr.*** | 8 t/v | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v |
| ***Almennar grundlærugr.:*** | | | | |
| - føroyskt | 4 t/v | 3 t/v | | |
| - støddfrøði | 4 t/v | 3 t/v | | |
| - enskt | | 4 t/v | 3 t/v | |
| - alisfrøði | | 4 t/v | 3 t/v | |
| - evnafrøði | | | 4 t/v | 3 t/v |
| - lívfrøði | | | 4 t/v | 3 t/v |
| ***Vallærugreinir*** *(inkl. innl.)* | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v |
| ***Evnisskeið*** | | 2 t/v | | 2 t/v |
| t/v um vikuna: | 40 | 40 | 36 | 36 |

- Tær *fakligu* grundlærugreinirnar hava hvør sær í flestu førum færri tímar, og eru hesar sermerktar á tann hátt, at tær stuðla fatanina av innihaldinum í yrkislærugreinunum.
- Tær *almennu* grundlærugreinirnar enda allar á einum C-stigi. Hesar lærugreinir í bæði fyrra og seinna støðisárinum eru: føroyskt, støddfrøði, enskt, alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði.
- Tímatalið í almennu grundlærugreinunum í støðisútbúgvingini er tað sama, sum tímatalið í øðrum miðnámsútbúgvingum.
- At 40 t/v eru í fyrra støðisárinum kemst av, at hetta tímatal er í yrkis-útbúgvingunum.

Sambært § 11 í uppskotinum til kunngerðina, eru lærugreinirnar í HT-breytini hesar (*Lærugreinir merktar *) halda fram í HT2 og HT3):*

***Myndil B: "HT-breytin"***

| **Lærugreinir:** | **Lærugreinastig** | **Tímar tils.** |
|---|---|---|
| Innleiðsluskeið | | 60 |
| Yrkislærugreinir | | 160 |
| Tøknifrøði | B *) | 260 |
| Støddfrøði | B *) | 200 |
| Føroyskt | A *) | 140 |
| Enskt | B *) | 140 |
| Alisfrøði | B *) | 160 |
| Evnafrøði | C | 140 |
| Lívfrøði | C | 140 |
| Tilsamans | | 1400 |

***Bygnaðurin í HT-breytini:***

- Tann valda yrkislærugreinin og tøknifrøði verða samansjóðaðar, og kunnu næmingar velja yrkislærugreinirnar: el, maskin, timbur og prosess.
- Náttúrulærugreinin verður býtt í tríggjar partar og samansjóðað í lærugreinunum: alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði. Harav koma 140-160 tímar til hvørja lærugrein.
- Lívfrøði og evnafrøði enda í HT1 á C-stigi. Næmingar kunnu síðani velja nevndu lærugreinir á B-stigi í HT2 ella í HT3.
- Føroyskt er kravt á A-stigi, og heldur lærugreinin fram í HT2 og HT3.
- Viðvíkjandi próvtøku, so eigur í minsta lagið 1 munnlig próvtøka at verða í HT-breytini við lutakasti millum lívfrøði og evnafrøði.

Á seinasta fundinum hjá arbeiðsbólkinum, sum var tann 26. mai í ár, varð samtykt at mæla Undirvísingar- og Mentamálastýrinum til at góðkenna, at royndar-undirvísing verður sett í verk á báðum skúlunum frá í august mánað í ár, soleiðis at eftirmetingar, tillagingar, ábøtur og møguligar broytingar í uppskotinum til kunngerð kunnu gerast, áðrenn sjálv kunngerðin endaliga verður lýst og skipanin sett í verk.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at uppskotið um kunngerð um støðisútbúgvingina innan tøkni, sum bólkurin hevur tilevnað og mælir til at seta í verk, tó fyribils sum royndarundirvísing, er í samsvari við lógina og við arbeiðssetningin í tilnevningar-skrivinum frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Í juni mánaði ár 2000

*Atli Feilberg Hansen, formaður* *Tummas Lauritsen*

*Eyðgunn Samuelsen* *Marita Hentze*

*Jógvan Hammer* *Petur Oluf Hansen*

*Uppskot um:*

**Kunngerð**
**um**
**støðisútbúgving innan tøkni**
**(SIT-høvuðskunngerðin)**

Við heimild í løgtingslóg nr. 105 frá 5. mars 1999 um støðisútbúgving innan tøkni (SIT) verður ásett:

**Kapittul 1**
***Stevnumið og bygnaður***

**§ 1.** Undirvísingin skal sum heild
1) menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
2) leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving og
3) nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið um ræður fakligan førleika og almennan kunnleika

*Stk. 2.* Lesiætlanirnar í yrkislærugreinum og grundlærugreinum, saman og í mest møguligan mun hvør sær, skulu síggja til, at næmingurin ognar sær teir førleikar, sum eru nevndir í § 3 í lógini. Teir meginførleikar, ið skulu røkkast í sambandi við SIT-útbúgvingina, eru lýstir í fylgiskjali 1.

**§ 2.** Undirvísingin á góðkendum yrkisskúla kann fevna um ein ella fleiri av hesum pørtum, sum landsstýrismaðurin góðkennir hvønn sær:
1) Ein eitt ára útbúgving við atliti at veita næmingunum:
   a) sjálvstøðugt prógv sambært § 2, stk. 1 í lógini,
   b) verða støði undir og partur av yrkisútbúgving sambært § 2, stk. 2 í lógini, og
   c) verða støði undir framhaldandi hægri tøkniligari próvtøku (HT) sambært § 2, stk. 4 í lógini.
2) Ein tvey ára støðisútbúgving við atliti at ávísum framhaldandi tøkniligum útbúgvingum sambært. § 2, stk. 3 í lógini.
3) Støðisútbúgving við avmarkaðari undirvísing fyri næmingum við serligum forkunnleikum sambært § 4, stk. 1 í lógini.
4) Stakgreinalestur, sjálvlestur ella fjarlestur sambært § 4, stk. 2 og 3 í lógini.

*Stk. 2.* Samlisið eigur at verða millum allar partarnar í tann mun, skúlin kann tryggja næminginum nøktandi undirvísing í lærugreinunum.
*Stk. 3.* Útbúgving eftir stk. 1, nr. 4 nýtist ikki at miða móti SIT-prógvi.
*Stk. 4.* Útbúgving eftir stk. 1, nr. 2 gevur prógv fyri fullførda støðisútbúgving, um treytirnar fyri at standa útbúgvingina eru loknar.

## Kapittul 2
## *Upptøka*

**§ 3.** Upptøkan til SIT-útbúgvingina er treytað av, at umsøkjari hevur lokið:
1) Fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokk) í føroyskum, donskum, enskum, rokning/støddfrøði við nóg góðum úrsliti, t.v.s., at umsøkjarin hevur verið innskrivaður til próvtøku í nevndu lærugreinum og fylgt undirvísingini í alis-/evnafrøði, ella
2) Víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans (10. flokk) við nóg góðum úrsliti.
*Stk 2.* Umsøkjari, sum ikki hevur møguleika at lúka treytirnar í stk. 1, t.d. vegna uppihald uttanlands ella útlendska bakgrund, kann verða tikin upp, um skúlin metir, at umsøkjarin hevur tær neyðugu fakligu og málsligu fyritreytirnar fyri at fullføra útbúgvingina til ásetta tíð. Umsøkjari kann vera vístur til eina upptøkuroynd, ið skúlin, sum søkt verður inn á, skipar fyri.
*Stk. 3.* Skúlin kann gera av, at umsøkjari við øðrum førleikum, ið samvara við krøvini í stk. 1, kann takast upp. Upptøka fer fram sambært meting skúlans av fakliga førleika umsøkjarans. Harafturat skal umsøkjarin vera førur fyri at fullføra útbúgvingina til ásettu tíðina. Umsøkjarin kann vera vístur til eina upptøkuroynd, samanber stk. 2.
*Stk. 4.* Næmingar við serligum forkunnleika sambært § 2, stk. 1, nr. 3, skulu hava eina fullførda miðnámsútbúgving ella samsvarandi, samanber § 13.
*Stk. 5.* Umsøkjari, ið lýkur upptøkutreytirnar eftir stk. 1 - 4, ella sum eftir meting skúlans lýkur fakligu fortreytirnar í tí ávísu lærugreinini, sum søkt verður um upptøku á, kann takast upp sum stakgreinalesandi/-sjálvlesandi í støkum lærugreinum.
*Stk.6.* Næmingur skal kunna velja ímillum tær undirvísingarbreytir, sum skúlin hevur (t.e. Tøknibreytina ella HT-breytina), og sum skúlin metir hann skikkaðan til. Skúlin hevur skyldu til at vegleiða næmingar í sambandi við vali av undirvísingarbreyt.
*Stk.7.* Velur næmingur eina undirvísingarbreyt, ið viðkomandi skúli ikki hevur nokk av næmingum til, skal næmingurin fáa tilboð um hesa breyt á øðrum skúla, ið hevur viðkomandi breyt.

**§ 4.** Ein, sum ikki hevur tikið fyrra støðisárið, kann vera tikin upp til seinna støðisárið, um viðkomandi á annan hátt hevur nomið sær kunnleika samsvarandi innihaldinum í fyrra støðisárinum, og um skúlin metir umsøkjarin føran fyri at fullføra útbúgvingina innan ásetta tíðina. Umsøkjarin kann vera vístur til eina upptøkuroynd.

## Kapittul 3
### *Innihaldið í útbúgvingini*

§ **5.** Fyrra støðisárið er býtt upp í 1. og 2. støðiseind. Seinna støðisárið er býtt upp í 3. og 4. støðiseind. Útbúgvingin er eisini skipað í tvær undirvísingarbreytir: Tøkni-breytin og HT-breytin.
*Stk.* 2. Tøknibreytin er skipað samsvarandi ásetingarnar í yrkisútbúgvingunum.
*Stk. 3.* Tøknibreytin heldur fram í seinna støðisárinum. Eftir samtykt av avvarðandi yrkisnevnd, gevur hon avriksflutning til yrkisútbúgvingarnar.
*Stk .4.* HT-breytin er 1 ár og er skipað samsvarandi krøvunum í framhaldandi útbúgvingini til HT próvtøku.
*Stk. 5.* Allir næmingar fáa persónliga vegleiðing í samband við vali av tøknibreyt. Skúlin ger av, hvussu vegleiðingin skal skipast, og fevnir hon vanliga um 2 vikur.

§ **6.** Lærugreinirnar eru býttar upp í yrkislærugreinir, fakligar og almennar grundlærugreinir, vallærugreinir og evnisskeið.
*Stk.2.* Innihaldið í seinna støðisárinum skal vera skipa samsvarandi krøvunum til framhaldandi útbúgvingar innan tað ávísa fakøkið.
*Stk. 3.* Lesiætlanirnar fyri yrkislærugreinirnar og fakligu grundlærugreinirnar skulu samtykkjast av viðkomandi yrkisnevnd. Lesiætlanirnar fyri almennu lærugreinirnar skulu góðkennast av Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

§ **7.** Yrkislærugreinirnar skulu miða móti at menna tann fakliga førleikan, ið sermerkir tað ávísa útbúgvingina ella útbúgvingarbólkin.

§ **8.** Grundlærugreinirnar eru býttar upp í:
a) fakligar grundlærugreinir, ið skulu rúmka um yrkislærugreinirnar og saman-binda tær fyri at røkka førleikakrøvunum, sum ásett eru í meginreglunum fyri innihaldið í útbúgvingunum (samanber fylgiskjal 1).
b) almennar grundlærugreinir, ið geva næminginum serligan førleika, herundir áhuga næmingsins ella sum eru neyðugir við atliti at ávísum yrkis- og lestrarførleikakrøvum.

*Stk. 2.* Grundlærugreinirnar kunna í ávísan mun verða framdar sum partur av undirvísingini í evnisskeiðum, men kunnu annars vera fastur partur í tímatalvum skúlans yvir stytri ella longri tíðarskeið, samanber § 12.

§ **9.** Vallærugreinirnar eru lærugreinir, sum skulu stuðla uppundir at nøkta serligan áhuga og serlig útbúgvingarynski hjá tí einstaka næminginum.
*Stk. 2.* Allir næmingar í støðisútbúgvingini skulu hava minst eina vallærugrein um árið.

§ **10** Lærugreinirnar í tøknibreytini eru hesar:

| | **Fyrra støðisár** | | **Seinna støðisár** | |
|---|---|---|---|---|
| | **1. støðiseind** | **2. støðiseind** | **3. støðiseind** | **4. støðiseind** |
| ***Lærugreinir og stig*** | ***20 v á 40 t.*** | ***20 v á 40 t.*** | ***20 v á 36 t.*** | ***20 v á 36 t.*** |
| ***Yrkislærugreinir*** | 20 t/v | 16 t/v | 14 t/v | 20 t/v |
| ***Fakligar grundlærugr.*** | 8 t/v | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v |
| ***Almennar grundlærugr.:*** | | | | |
| - føroyskt | 4 t/v | 3 t/v | | |
| - støddfrøði | 4 t/v | 3 t/v | | |
| - enskt | | 4 t/v | 3 t/v | |
| - alisfrøði | | 4 t/v | 3 t/v | |
| - evnafrøði | | | 4 t/v | 3 t/v |
| - lívfrøði | | | 4 t/v | 3 t/v |
| ***Vallærugreinir*** *(inkl. innl.)* | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v | 4 t/v |
| ***Evnisskeið*** | | 2 t/v | | 2 t/v |
| t/v um vikuna: | 40 | 40 | 36 | 36 |

§ **11.** Lærugreinirnar í HT-breytini eru hesar *(Lærugreinirnar á A- og B-stigi halda fram 2. og 3. árið)*:

| **Lærugreinir:** | **Stig** | **Tímar** |
|---|---|---|
| Innleiðsla | | 60 |
| Yrkislærugreinir | | 160 |
| Tøknifrøði | B * | 260 |
| Støddfrøði | B * | 200 |
| Føroyskt | A * | 140 |
| Enskt | B * | 140 |
| Alisfrøði | B * | 160 |
| Evnafrøði | C | 140 |
| Lívfrøði | C | 140 |
| Tilsamans | | 1400 |

*Stk. 2.* Yrkislærugreinir á HT–breytini eru býttar eftir fakøki sambært § 5 stk. 2.
*Stk. 3.* Skúlin skal bjóða næmingunum á HT-breytini yrkislærugreinir í minst tveimum fakøkjum.

**§ 12.** Skúlin kann seta undirvísingartímar av í árligu undirvísingarætlanini til evnisskeið, til serlig tiltøk og til serliga undirvísing. Avsetingin kann verða gjørd sum einstakir dagar ella einstakir tímar, sum røkka yvir eitt styttri ella longri tíðarskeið. Dømi um serlig tiltøk/serliga undirvísing eru: Ungt virki, serlig telduforrit, teldukoyrikort, persónlig viðurskifti, virkisvitjan, lestrarferð, tvørfaklig málllæra ella undirvísing í øðrum tvørfakligum evnum, fyrilestrar, filmsýningar, vitjanir í listaskálum og sølustevnum.
*Stk. 2.* Evnisskeiðini eru millum 40 og 70 pultstímar í einum samanhangandi skeiði í tíð og evni (tema), ið kunnu verða løgd sum fastur partur í árligu undirvísingarætlanini. Endamálið við evnisskeiðunum er at læra næmingarnar at samstarva um loysnir av ítøkiligum uppgávum, ið skulu vera so fjølbroyttar og tvørfakligar, sum til ber.
*Stk. 3.* Evnisskeiðsundirvísingin eigur hjá tí einstaka næminginum at fevna um í mesta lagið 70 tímar hvørt ári.
*Stk.4.* Evnisskeiðini skulu leggjast til rættis eftir reglunum í serstøkum skjali (samanber fylgiskjal 3).

**§ 13.** Sum grundarlag undir eini framhaldandi yrkisútbúgving fyri næmingum við serligum forkunnleikum, samanber § 4, stk. 1 í lógini og § 2, stk. 1, nr. 3 í hesi kunngerð, eru minstukrøvini fyri loknari støðisútbúgving hesi:
- Yrkislærugreinir og tøknifrøði á B-stigi í HT-linjuni, ella
- Yrkislærugreinir og fakligar grundlærugreinir samsvarandi krøvunum til framhaldandi yrkisútbúgving.

*Stk. 2.* Undirvísingin verður løgd til rættis sum stakgreinaundirvísing. Skúlin kann, um fíggjarligar fyritreytir er fyri tí, seta flokkar á stovn sum dag- ella kvøldundirvísing, um næmingagrundarlagið er nøktandi, og um tímatalið fyri lærugreinirnar verður skert við einum fimtingi.
*Stk. 3.* Farið verður til próvtøku eftir reglunum í kapitli 5.
*Stk. 4.* Skúlin ásetir lærugreinagjald, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið góðkennir, fyri undirvísing eftir hesi grein.

**§ 14.** Skúlin kann skipa fyri stakgreinalestri, sjálvlestri og fjarlestri samsvarandi § 4, stk. 3 í lógini.
*Stk. 2.* Skúlin kann skipa fyri serligum flokkum til stakgreinalestur í lærugreinum, sum hoyra undir § 2, stk. 1 nr. 1 og 2, um næmingagrundarlagið er nøktandi, og um tímatalið fyri lærugreinirnar verður skert við einum fimtingi.
*Stk. 3.* Skúlin eigur at geva fjarbúgvum møguleika at taka stakgreinalestur sum fjarlestur, um skúlin hevur møguleika til tess.
*Stk. 4.* Farið verður til próvtøku í teimum í stk. 1 nevndu skipanum eftir reglunum í kapitli 5.
*Stk. 5.* Skúlin ásetir lærugreinagjald, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið góðkennir fyri undirvísing eftir hesi grein.

**§ 15.** Skúlin skal, í góðari tíð áðrenn undirvísingin byrjar, lýsa undirvísingina eftir hesi kunngerð í árligu undirvísingarætlanini.
*Stk. 2.* Tann einstaki skúlin ger av, hvussu hann í árligu undirvísingarætlanini skipar skúlagongdina millum samtyktu yrkislærugreinirnar, grundlærugreinirnar, vallærugreinirnar og evnisskeiðini.

*Stk. 3.* Skúlin ger av, í hvønn mun lærugreinir verða lisnar saman í smærri ella størri blokkum, treytað av, at málini fyri undirvísingina verða rokkin, samanber § 2, stk. 2.
*Stk. 4.* Árliga undirvísingartímatalið hjá tí einstaka næminginum er vanliga í minsta lagi 700 tímar, samanber tó tímatalið í talvunum í §§ 10 og 11. Umleið 2 vikur verða settir av til innleiðsluskeið, 3 vikur til próvtøku og umleið 35 vikur til undirvísing.

**§ 16.** Yrkislærugreinir, grundlærugreinir og vallærugreinir skulu hava hvør sína lesiætlan.
*Stk. 2.* Undirvísing í lærugreinum hjá øðrum skúlum verður framd eftir lesiætlanum hjá hesum skúlum.
*Stk. 3.* Skúlin skal so langt til ber fremja undirvísingina:

1. við samstarvi millum lærararnar um undirvísing og millum lærugreinir
2. við at nýta kunningartøkni í mest møguligan mun, har tað er natúrligt
3. soleiðis at styrkt verður í øllum lærugreinum um skrivligar og munnligar málbúnar, og
4. soleiðis at endamálini viðvíkjandi fakligari breidd, lestrarførleika, yrkisførleika, førleikununum í § 1, stk. 2, persónsmenning og samfelagsskiljan í mest møguligan mun verða rokkin í hvørjari lærugrein sær og sum heild.

*Stk. 4.* Skúlin kann góðkenna, at lærugrein, sum hevur fleiri lærugreinastig, kann verða lisin undir einum, har tað er hóskandi og fyriskipanarlig, fyrisitingarlig og námsfrøðilig viðurskifti ikki forða tí.

**§ 17.** Undirvísingin skal javnan eftirmetast til innanhýsis nýtslu, soleiðis at næmingar og lærarar fáa kunnleika um úrslitið av undirvísingini. Harumframt skal fakliga støðið hjá tí einstaka næminginum eftirmetast til uttanhýsis nýtslu. Hetta verður gjørt við støðumeti og ársmeti.

**§ 18.** Àrsmet verða givin við skúlaárslok í øllum lærugreinum, sum næmingurin hevur haft, og skrivað í próvtøkubók í seinasta lagi 7 dagar, áðrenn próvtøkuætlanin fyri tær munnligu próvtøkurnar verður almannakunngjørd. Um møguleiki er fyri bæði skrivligari og munnligari próvtøku, skal ársmet gevast í báðum førum. Tó skulu stakgreinalesandi og sjálvlesandi, og tey, ið fara upp eftir serligum treytum, ikki hava ársmet.
*Stk .2.* Ársmet er meting lærarans av fakligu støðu næmingsins við undirvísingarlok. Miðskeiðis í skúlaskeiðinum skal næmingurin hava støðumet í viðkomandi lærugreinum. Støðumetið er meting lærarans um støðu næmingsins miðskeiðis í skúlaárinum. Listi við støðumeti skal undirskrivast av læraranum og latast skúlanum sambært reglum, sum skúlin ásetir. Skúlin skal varðveita hesar listar í minsta lagi 1 ár.
*Stk. 3.* Ì teimum lærugreinum, har næmingurin ikki fer til próvtøku, verður ársmetið sett í teigin “flutt ársmet” í próvtøkubókini.

## Kapittul 4
### *Næmingaskyldur*

**§ 19.** Næmingur hevur skyldu at fylgja undirvísingini og at lata inn skrivlig avrik, eisini um viðkomandi skal til próvtøku eftir serligum treytum, samanber § 20 stk. 4.
*Stk. 2.* Næmingarnir skulu kunnast um møtiskylduna og um skyldu at lata inn skrivlig avrik. Somuleiðis skulu næmingarnar kunnast um avleiðingarnar av, um hesar skyldur ikki verða hildnar.
*Stk. 3.* Skúlin sær til, at frávera regluliga verður skrásett og gjørd upp. Frávera hjá tí einstaka næminginum verður gjørd upp fyri hvørt undirvísingarár sær. Vantandi innlating av skrivligum avrikum verður somuleiðis skrásett.
*Stk. 4.* Um fráveran hjá einum næmingi samanlagt fer upp um 15 % av ásetta tímatalinum (tímum, sum eiga at verða lisnir) ella av kravdum skrivligum avrikum, verður næmingurin kallaður til samrøðu, har hann fær munnliga ávaring. Um næmingurin eftir meting skúlans við seinni uppgerð skúlans ikki hevur tikið samrøðuna til eftirtektar, fær hann móti kvittan skrivliga ávaring. Er næmingurin undir 18 ár, verður ávaringin send foreldramyndugleikanum í innskrivaðum brævi.
*Stk. 5.* Tá frávera ella vantandi innlating av kravdum skrivligum avrikum samanlagt fer upp um 15% sambært stk. 4, skal næmingurin til próvtøku eftir serligum treytum í øllum lærugreinum sambært ásetingum í § 20 stk. 4. Í slíkum føri skal hetta fráboðast Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.
*Stk. 6.* Er fráveran meira enn 20% í einari lærugrein, fer næmingurin til próvtøku eftir serligum treytum í øllum lærugreinum. Í slíkum føri skal hetta fráboðast Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.
*Stk. 7.* Skúlastjórin kann, út frá einari heildarmeting av umstøðum og lestrarvirkni næmingsins, víkja frá reglunum í stk. 4-6. Næmingur, sum fer til próvtøku eftir serligum treytum fyrsta árið, og heldur krøvini til uppmøting og innlating av skrivligum avrikum annað árið, fer eftir hetta til próvtøku eftir vanligum treytum.
*Stk. 8.* Um næmingurin framhaldandi av vansketni ikki lýkur møtuskylduna, og fráveran er oman fyri 15%, kann skúlastjórin gera av, at næmingurin verður vístur burtur frá undirvísingini

## Kapittul 5
### *Próvtøka / roynd*

***Innskriving til próvtøku / roynd:***

**§ 20.** Um so er, at undirvísingin í yrkislærugreinum og fakligum grundlærugreinum er samskipað við undirvísingina fyri lærlingar, fara næmingarnir upp til roynd saman við lærlingunum og samsvarandi reglunum fyri viðkomandi yrkisútbúgving. Verður undirvísingin ikki samskipað, fara næmingarnir upp til roynd í yrkislærugreinum og fakligum grundlærugreinum samsvarandi reglunum, ið eru galdandi í yrkisútbúgvingarskipanini.
*Stk. 2.* Próvtøka í øðrum lærugreinum enn teimum í stk. 1, verður hildin við endan á undirvísingarskeiðinum, næmingur, ið hevur lógligt forfall kann fara til sjúkrapróvtøku, samanber § 23.

*Stk. 3.* Próvtøkukrøv og próvtøkuhættir, tá ið farið verður upp til roynd eftir stk. 2, eru ásettir í reglum hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skúlin skal í miðskeiðis í undirvísingarskeiðnum boða Undirvísingar- og Mentamálastýrinum frá, hvørjir næmingar skulu til próvtøku í vanliga próvtøkuskeiðinum, og hvørjar lærugreinirnar eru. Skúlin letur inn upplýsingar á oyðublaði, ið Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger. Skúlin skal boða Undirvísingar- og Mentamálastýrinum frá broytingum skjótast til ber.
*Stk. 4.* Fyri næming, sum fer til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkusetningurin tann sami sum lesisetningurin. Næmingur, sum fer til próvtøku eftir serligum treytum, skal til próvtøku í øllum lærugreinum, samanber § 19, stk 5.
*Stk. 5.* Eingin næmingur kann innskriva seg til próvtøku í einari lærugrein á sama stigi meira enn 2 ferðir. Undirvísingar- og Mentamálastýrið kann loyva, at vikið verður frá hesum reglum, um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

***Skipan av próvtøku / roynd:***

§ **21.** Undirvísingar- og Mentamálastýrið tekur út millum allar almennar grundlærugreinir, og vallærugreinir, sum næmingurin hevur fingið undirvísing í, 2 lærugreinir hvørt árið, sum næmingurin skal til próvtøku í, munnliga og/ella skrivliga.
*Stk. 2.* Fyri próvtøku eftir serligum treytum eftir 1. og 2. støðisárið eru hesar reglur galdandi:

1) Næmingurin fer til próvtøku í øllum lærugreinum á avvarandi floksstigi. Í lærugreinum, har bæði munnlig og skrivlig ella verklig próvtøka er, skal næmingurin til próvtøku eftir øllum próvtøkuhættunum.
2) Próvtøkusetningurin er tann sami sum lesisetningurin.
3) Næmingurin fær ikki ársmet, tá ið hann fer til próvtøku eftir serligum treytum.

*Stk. 3.* Hvør próvtakari kann bert fara til eina próvtøku um dagin. Tó kann undantak gerast fyri næmingum, sum fara upp eftir serligum treytum.

§ **22.** Undirvísingar- og Mentamálastýrið ásetir nær tær skrivligu og munnligu próvtøkurnar samsvarandi § 21, stk. 1 verða hildnar. Próvtøkutalvan fyri HT-breytina verður send skúlanum í seinasta lagi 15. apríl. Próvtøkutalvan er tá loynilig, og bert skúlastjórin ella ein av honum heimilaður persónur hevur loyvi at kanna hana.
*Stk. 2.* Próvtøkutalvan má ikki kunngerast fyrr enn seinasta undirvísingardag.

§ **23.** Næmingur, ið er innskrivaður til próvtøku í vanliga próvtøkuskeiðinum, men sum vegna sjúku heilt ella lutvíst hevur verið forðaður at fara til próvtøku, kann innskriva seg til sjúkrapróvtøku í teimum lærugreinum, hann vegna sjúku varð forðaður at fara til próvtøku í. Til innskrivingina skal nýtast oyðublað, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger.
*Stk. 2.* Undirvísingar- og Mentamálastýrið kann, um serlig viðurskifti gera seg galdandi, loyva næmingi, ið er innskrivaður til próvtøku í vanliga próvtøkuskeiðinum, men sum av aðrari orsøk enn sjúku ikki ella bert lutvíst hevur verið til próvtøku, at fara til próvtøku í sjúkrapróvtøkuskeiðinum.
*Stk. 3.* Næmingur í tøkni-breytini, sum ynskir at fara til endurpróvtøku eftir ávikavist stk. 1 ella 2, skal skrivliga boða skúlanum frá hesum í seinasta lagi 25. juni.

*Stk. 4.* Próvtøkur í sjúkrapróvtøkuskeiðinum í HT-breytini verða hildnar eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri próvtøkur í vanliga próvtøkutíðarskeiðinum, tó soleiðis, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið skal hava fráboðan um næmingar, ið skulu til próvtøku í sjúkrapróvtøkuskeiðinum í seinasta lagi 27. juni, samanber § 20, stk.3.

***Prógv:***

§ **24.** Næmingar, sum hava staðið SIT-útbúgvingina fáa útflýggjað prógv. Næmingar í HT-breytini fáa tó støðumet við próvtølum/ársmetum. Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger skjal hesum viðvíkjandi.
*Stk. 2.* Í prógvinum skal standa:
1) Øll ársmet, sum telja við til SIT-próvtøkuna.
2) Próvtølini, herundir flutt ársmet. Tá ið talan er um flutt ársmet, skal hetta greitt tilskilast.
3) Metingin av royndini í yrkislærugreinum og fakligum grundlærugreinum.
4) Um ein lærugrein bæði hevur skrivligan og ein munnligan tátt, verða ársmet, ávíkavíst próvtøl, tiskilað fyri hvønn tátt sær.

*Stk. 3.* Eitt miðaltal verður við einum desimali roknað út av ársmetum í lærugreinum, sum telja við til SIT-próvtøkuna.
*Stk. 4.* Eitt miðaltal verður við einum desimali roknað út av próvtølum í lærugreinum, sum næmingurin hevur verið til próvtøku í, og av teimum fluttu ársmetunum.
*Stk. 5.* Endaliga próvtøkuúrslitið verður roknað út sum eitt miðaltal við einum desimali av ársmetunum, samanber stk. 3, og av próvtølunum og teimum fluttu ársmetunum, samanber stk. 4.

§ **25**. Næmingur, sum fer til próvtøku sum sjálvlesandi, fær ikki ársmet og ei heldur flutt ársmet.

§ **26.** Stakgreinalesandi, sum hevur verið til próvtøku í einari ella fleiri lærugreinum, fær skjalváttan frá skúlanum við frásøgn um próvtal/tøl. Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger skjal hesum viðvíkjandi.
*Stk. 2.* Næmingar kunnu frá skúlanum fáa skjalváttan fyri próvtøkur, sum ikki verða roknaðar við í próvtøkuúrslitinum.

## Kapittul 6
## *Kærur*

§ **27.** Næmingur kann kæra avgerð skúlastjórans sambært hesi kunngerð, herundir avgerð um burturvísing og onnur agatiltøk, til Undirvísingar- og Mentamálastýrið innan 7 dagar eftir at næmingurin er kunnaður um avgerðina.
*Stk. 2.* Um næmingur ikki er myndugur, verður avgerð skúlastjórans eisini send tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

*Stk. 3.* Kæran verður send skúlastjóranum skrivliga, og sendir hann hana víðari til Undirvísingar- og Mentamálastýrið saman við einum ummæli av málinum. Áðrenn málið verður sent Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, skal skúlastjórin geva tí, ið kærir, møguleika fyri innan eina viku at gera viðmerkingar til ummælið. Møguligar viðmerkingar skulu eisini sendast Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.
*Stk. 4.* Landstýrismaðurin ger av, um avgerð skúlastjórans skal standa við, ella um avgerðin skal broytast til frama fyri tann, sum kært hevur.

## Kapittul 7
### *Aðrar ásetingar*

**§ 28.** Skúlaárið er 200 dagar, próvtøkuskeiðið íroknað.

**§ 29.** Skúlin ásetir gjald fyri stakgreinalesandi, sjálvlesandi og fjarlesandi, sum verður mett eftir kostnaðinum, ið skúlin hevur av hesum. Undirvísingar- og Mentamálastýrið skal góðkenna gjøldini.
*Stk. 2.* Skúlin ásetir gjøld fyri ljóstøku, sum verður mett eftir kostnaðinum, ið skúlin hevur av hesum.

## Kapittul 8
### *Gildiskoma*

**§ 30.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis, sum henda kunngerð kemur í gildi, fer kunngerð nr. 101 frá 12. apríl 1994 um støðisútbúgving innan tøkni úr gildi.
*Stk. 3.* Kunngerðin er tó galdandi fyri næmingar, sum byrjaðu støðisútbúgvingina innan tøkni áðrenn 1. august 1999.

------------

## Almennar viðmerkingar:

SIT-skipanin varð á fyrsta sinni sett í verk við skúlaársbyrjan í august 1992 sambært løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992. Kunngerðin við heimild í hesi lóg, kunngerð nr. 85, varð lýst tann 12. juli 1994 við gildi frá 13. juli 1994.

Nýggj lóg um støðisútbúgving innan tøkni, løgtingslóg nr. 41, er frá 23. apríl 1999 varð sett at galda frá 1. august 1999.

Broytingarnar í nýggju lógini eru í høvuðsheitum hesar:
- greiðari reglur um bygnaðin
- greiðari endamálsorðingar
- greiðari reglur um námsfrøðiligu førleikakrøvini
- greiðari orðing um vinnuførleika eftir loknað útbúgving
- greiðari orðing um samlesing og samskipan av undirvísingini

Undirvísingar- og Mentamálastýrið setti á vári 1999 ein arbeiðsbólk til at tilevna uppskot um kunngerð (høvuðskunngerð) við støði í hesi lóg.

Arbeiðsbólkurin, sum javnan hevur havt fundir í árinum, bólkurin hevur sitið, letur við hesum úr hondum eitt uppskot, sum bólkurin metir vera í samsvari við galdandi lóg og í samsvari við tilmælini í tilnevningarskrivi Undirvísingar- og Mentamálastýrisins.

Í høvuðsheitum kann fyriliggjandi uppskot um høvuðskunngerð um støðisútbúgvingina innan tøkni lýsast soleiðis:
- at tað skal bera til at samlesa við aðrar viðkomandi útbúgvingar, og at tað skal bera til at samskipa útbúgvingina við aðrar yrkisútbúgvingar
- at støðisútbúgvingin skal kunna veita avriksflutning, herundir bæði viðvíkjandi skúlagongd og lærutíð, um næmingur aftaná fer undir eina yrkisútbúgving
- at førleikakrøvini í yrkislærugreinum í støðisútbúgvingini skulu samsvara við krøvini í yrkisútbúgvingunum
- at førleikakrøvini í almennum lærugreinum skal verða nøktandi við atliti at framhaldandi/víðari útbúgvingum

Arbeiðsbólkurin hevur skipað kunngerðina soleiðis, at tað <u>ikki</u> kann væntast, at útbúgvingin fer at hava nakran meirkostað í mun til skipanina frá 1992. Tvørturímóti metir arbeiðsbólkurin, at skipanin – við tað at serligur dentur er lagdur á at samskipa støðisútbúgvingina við yrkisútbúgvingarnar – kemur at hava eitt lægri útreiðslustøði.

## Viðmerkingar til ávísar greinir:

*Til § 2, stk. 1, punkt 3:*
Her verður hugsa um næmingar, ið hava HH ella HF prógv, og eru í læru ella fara undir eina tøkniliga yrkisútbúgving. Við fullførda útbúgving meinast her við loknað støðisútbúgving í 1 ella 2 ár.

*Til §§ 7 og 8:*
Verkligu yrkislærugreinirnnar og fakligu grundlærugreinirnar hoyra nátúrliga saman, soleiðis at skilja, at fakligu grundlærugreinirnar eru beinleiðis ætlaðar at stuðla og menna fatanina av innihaldinum í yrkislærugreinunum. Sum dømi kann nevnast týdningin av, at næmingar, sum hava valt maskin- ella smiðjuyrkið, verða kunnaðir um umhvørvismál, herundir um oljudálking o.l. Eisini er viðkomandi, at næmingarnir fáa kunning um arbeiðsmarknaðarviðurskifti, kunningartøkni og onnur líknandi viðurskifti, sum kunnu fáa týdning við atliti at yrkisútbúgvingarøkinum.

*Til § 10:*
Allar almennar grundlærugreinir í 1. støðiseind byrja á E-stigi og enda á C-stigi í 2. støðiseind.
Næmingur, sum hevur lokið bæði støðisárini (t.e. 1.-4. støðiseind), hevur samanlagt 6 lærugreinir á C-stigi.
Tímatalið í teimum almennu lærugreinunum í 2-ára støðisútbúgvingini (t.e. føroyskt støddfrøði, enskt, alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði) er tað sama, sum tímatalið í øðrum miðnámsútbúgvingum.
At 40 t/v eru í fyrra støðisárinum kemst av, at hetta tímatal er í yrkisútbúgvingunum.

*Til § 11:*
Tann ávísa yrkislærugreinin og tøknifrøði verða samansjóðaðar soleiðis, at næmingarnir kunnu velja yrkislærugreinirnar: el, maskin, timbur og prosess.
Náttúrulærugreinin verður býtt í tríggjar partar og samansjóða í lærugreinunum: alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði. Sostatt koma 140-160 tímar at verða til hvørja lærugrein.
Lívfrøði og evnafrøði enda í HT1 á C-stigi. Næmingar kunnu síðani velja nevndu lærugreinir á B-stigi í HT2 ella HT3.
Føroyskt er kravt á A-stigi í HT-breytini, og heldur lærugreinin fram í HT2 og HT3.
Viðvíkjandi próvtøku, so eigur í minsta lagið 1 munlig próvtøka at verða í HT-breytini við lutakasti millum lívfrøði og evnafrøði.

*Fylgiskjal 1*

# Førleikaøkið í SIT-útbúgvingini

Skjalið fevnir um málini fyri førleikaøkini í sambært § 3, stk. 1 í lógini um støðisútbúgvingina innan tøkni.

***Persónligur førleiki***
Endamálið er at fremja persónliga menning, sjálvstøði, ábyrgdarkenslu, evni at samstarva og hug at læra. Næmingur skal í verki sannroyna, at arbeiðstilgongdir krevja yrkisligar, sosialar og persónligar førleikar.
Málini verða greinað í:
1. Sosialar førleikar
2. Persónligar førleikar

***Samfelagsligur førleiki***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær vitan um samfelagsbygnað, funktiónir og grundleggjandi virði fyri at fremja evni og viljan at taka lut í einum demokratiskum samfelagslívi bæði í persóns- og samfelagsviðurskiftum. Næmingurin skal ogna sær breiða vitan bæði um almenn og privat virki, og læra at skilja sín egna leiklut og møguleikar at ávirka.
Málini verða greinað í:
1. Einstaklingur og samfelag
2. Einstaklingur og vinnulív

***Tøkniligur førleiki:***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær vitan um tøknimenningina og hennara samanspæl við vinnu og samfelag. Næmingurin lærir at skilja avleiðingar av tøknimenningini, bæði tá ið tað snýr seg um tað sosiala samanspælið millum menniskju, og avleiðingar, ið tøknimenning kann hava á umhvørvið og náttúrutilfeingið.
Málini verða greinað í:
1. menniskja og tøknin
2. nátturan og tøknin
3. samanspæl millum samfelag og tøkni
4. at nýta tvørfakliga vitan við atliti at tøknimenning
5. at arbeiða verkætlanarskipað

***Fyriskipanarligur førleiki:***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær grundleggjandi vitan um bygnaðir, tilgongdir og serliga mentan, sum vanligast koma fyri í virkjum, og hvussu hesi hanga saman sínamillum og við búskaparligu stýringina, fyrisitingina, leiðsluna, samstarvið innanvirkja og umhvørvið. Næmingurin skal uppliva virki í verki og í høvuðsheitum kunna greina tey fyriskipanarliga.
Málini verða greinað í:
1) Umskapanartilgongd
2) Leiðsla og fyrisiting
3) Umhvørvi
4) Samstarv

***Samskiftisligur og kunningartøkniligur førleiki:***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær vitan um týdningin av kunningarviðgerð og samskifti í virkinum og í sambandinum við samfelagið uttanfyri. Næmingurin skal kunna loysa munnligar og skrivligar samskiftis- og kunningaruppgávur í virkinum við málsligum og analytiskum førleikum og hóskandi tøkniligum amboðum.
Málini verða greinað í:
1) Málnýtslu
2) Skrivligt samskifti
3) Munnligt samskifti
4) KT og KT-amboð

***Altjóða og mentanarligur førleiki***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær málsligan og mentanarligan førleika at kunna virka í og skoða altjóða viðurskifti. Næmingurin skal ogna sær vitan um mentanarlig virði og vinnu- og samfelagsviðurskifti í viðkomandi máløki.
Málini verða greinað í:
1) Fremmandamál og mentanarfatan
2) Mentanar- og handilssambond
3) Tøknilig innlæringaramboð

***Móðurmálsligur og mentanarligur førleiki:***
Endamálið er, at næmingurin ognar sær vitan um føroyskt mál og mentan við serligum atliti til føroyska vinnulívið við tí fyri eygað, at hann í øllum lutum natúrliga nýtir gott føroyskt mál og mentan sum upprunastøði.
Málini verða greinað í:
1) Føroyskt mál
2) Føroysk mentan
3) Skrivligt samskifti við serligum atliti til vinnulívið
4) Munnligt samskifti við serligum atliti til vinnulívið
5) KT og KT-amboð

*Fylgiskjal 2*

## Vegleiðandi reglur um evnisskeið

Teir lærarar, sum skulu standa fyri fremjingini av einum evnisskeiði, skulu leggja gjølliga ætlan í góðari tíð frammanundan.

**Ætlanin verður lýst skrivliga og skal í minsta lagi fevna um:**

1) Heiti
2) Grundgeving
3) Endamál
4) Mál fyri nøktan av
    a) Fakmálum (samanhang við fastar lærugreinir)
    b) Førleikamálum
5) Skipan av undirvísingini
6) Innihaldið í undirvísingini
7) Skipan av lærarum
8) Tíðarætlan
9) Høli og útgerð
10) Eftirmeting av
    a) Næmingunum
    b) Lærarunum og samstarvi teirra
    c) Skeiðinum
11) Møgulig próvtøkuverkætlan

*Fylgiskjal 3*

## Vegleiðandi reglur um ger av lesiætlanum

Hvør einstakur lærari ger lesiætlan útfrá hesum leisti fyri hvørja lærugrein sær:

1. Mál fyri undirvísingina
2. Innihald í undirvísingini
   - høvuðsevni
   - skrivlig avrik
   - valfrí evni
   - serligar viðmerkingar, viðurskifti, tiltøk o.a.
3. Eftirmetingar í skúlaárinum
4. Ársroyndir og endalig próvtøka
   - skrivlig
   - munnlig
   - praktisk roynd
   - annar royndarformur
   - hvussu royndin telur við í samlaða úrslitinum
   - pensaviðurskifti
   - loyvd hjálparamboð
5. Skjal, sum vísir, í hvussu stóran mun lesiætlanin nøktar endamálum og førleikakrøvum
6. Annað

-------------------